


## Grundskeið fyri hjálparfólk í vøggustovu og barnagarði

Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið

**í døgunum 26/02 til 16/03 2001**

**Skeiðið er ætlað:**
Fólki, ið ikki hava pedagogiska útbúgving, men sum arbeiða í ella ynskja at arbeiða í barnagarði ella vøggustovu.

**Endamál:**
- At geva kunnleika til at kunna koma inn í tað pedagogiska arbeiðið út frá vitan um førleikar hjá børnum og alla teirra lívsstøðu.
- At geva innlit í samfelagsligar uppgávur og lógargrundarløg, rættindi og pliktir í tí dagliga arbeiðnum hjá einum stovni.
- At vísa, hvussu fólk kunnu taka virknan lut í dagligu viðurskiftunum millum børn, foreldur og starvsfelagar.

**Kostnaður:**
Kr. 8.250,-

**Skeiðleiðari:**
Lærari frá pedagog-læraraskúlanum CVU-Vest í Danmark.

**Tilmelding:**
Áðrenn 8. februar 2001

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag, kl. 8–12 & 13–16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo




Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



## FRISØRAR

Treytað av m.a. nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í samstarvi við
Stuhr Inter-Scool:

### Vár- og summarmóti

**Vikuskiftið 10. og 11. februar 2001**

Demonstratión leygardag, Tórshavn
10/02 kl. 15.00–19.00 kr. 1.750,-
Demonstratión sunnudag, Klaksvík
11/02 kl. 15.00–19.00 kr. 1.750,-
Demonstratión sunnudag, Tvøroyri
11/02 kl. 13.00–17.00 kr. 1.750,-
Praktik hold I sunnudag, Tórshavn
11/02 kl. 08.00–12.00 kr. 1.250,-
Praktik hold II sunnudag, Tórshavn
11/02 kl. 13.00–17.00 kr. 1.250,-

Skeiðleiðari: ***Frá Stuhr Inter-School.***

Luttakaratal:
Leygardagur Tórshavn – óavmarkað
Sunnudagur Klaksvík – óavmarkað
Sunnudagur Tvøroyri – óavmarkað
Sunnudagur Tórshavn – hægst 12 pr. hold

Tilmelding: **áðrenn 20. januar 2001**

Luttakarar við sveinabrævi innanfyri frisørfakið kunnu fáa helmingin í studningi frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag–fríggjadag, kl. 8–12 & 13–16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo

## Deildarleiðari til ALS

Starvið sum deildarleiðari á Tryggingar- & ávísingardeildini er leyst at søkja

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum er, í góðum samskifti við starvsfólkið, at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini.

Tryggingar- & ávísingardeildin, sum í løtuni hevur 12 starvsfólk, umsitur:

- vanligan arbeiðsloysisstuðul
- fiskavirkisskipanina
- arbeiðsávísing
- førleikagevandi tiltøk
- farloyvisstuðul
- flyting millum A-kassar og
- arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi

Starvið er fjølbroytt og avbjóðandi. Deildarleiðarin skal tí hava hóskandi útbúgving og góðar starvsroyndir, umframt hava gott innlit og áhuga í føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Viðkomandi skal vera før/ur fyri og hava hug til, við samstarvi og virkisfýsni, framhaldandi at menna tænastustøðið hjá deildini.

Arbeiðsloysisskipanin stendur støðugt fyri broyttum arbeiðsfortreytum, og skal deildarleiðarin hava evnir at tillaga seg broytingum í arbeiðsumstøðunum.

Deildarleiðarin myndar, saman við deildarleiðaranum fyri Fíggjar- & fyrisitingardeildina og stjóranum, dagligu leiðsluna á Arbeiðsloysisskipanini.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal verða Arbeiðsloysisskipanini í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. januar 2001.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum kann geva nærri upplýsingar um starvið á telefon 349537.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo

Hervið verður søkt eftir einum

## Sølufólki m/k

at byrja skjótast gjørligt.

Høvuðsuppgávan hjá sølufólkinum verður innkeyp og søla av køkum, baðirúmsmøblum, hvítvørum, skrivstovuinnbúgvi o.ø.
Køkar og baðrúmsmøblar verða teknaðir við framkomnari telduútgerð.
Eisini kemur tú at hava marknaðarføring felagsins um hendi.

Rætti umsøkjarin hevur hollan kunnleika til EDV, bókhald og marknaðarføring.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja og tosa við Símun Mittún.
(eftir arbeiðstíð tlf. 44 8408).

Umsóknin saman við CV skal vera okkum okkum í hendi í seinasta lagi 23.01.2001.

**pf Klement Petersen**
Heiðavegur · Postboks 99 · FO-600 Saltangará
Tlf. 44 7560 · Fax 44 8460 · E-mail: klp@post.olivant.fo

Sum starvsfólk hjá Pf. Klement Petersen, gerst tú ein partur av einum starvsfólkaskara uppá 7 starvsfólk, sum samstarva í einum góðum og hugnaligum arbeiðsanda. Til tíðir er rættuliga nógv at gera, so tí kanst tú rokna við, onkuntíð at arbeiða longri enn vanligan arbeiðsdag.

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Suzuki Swift GLX, 5 hurðar
**Motorur:** 993 ccm, 1.OL, 39/40 KW
**Árg.:** 1999
**KM.:** 18.761
**Eyka útgerð:** El-rútar framman, el-spegl, sentrallás, ABS-system, airbag

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Tlf. 345600 – lokal 728
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 10.00–12.00

## Regluligu býráðsfundirnir

### hjá Runavíkar býráð 2001

verða hesar dagar kl. 17.30 í býráðshøllini:
25/01 – 22/02 – 29/03 – 26/04 – 31/05 – 28/06 – 30/08 – 27/09 – 25/10 – 29/11 og 20/12.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega vera býráðnum í hendi 14 dagar áðrenn fundin.

**Runavíkar býráð**

## Til sølu

Videoútleiging, nógvir filmar o.a. bíliga til sølu.
Áhugað skrivið til:

Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 04.01.